

*Enn er ringt hjá fólki at ímynda sær, hvussu sethúsini hjá Thorleif Eyðun Petersen kom at síggja út. Hugskotini hava verið mong, og úr teimum øllum hevur hann valt ta bestu loysnina við tí besta útsýninum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Fyri Thorleif Eyðun og húsfólkið hevði júst hetta sín avgerandi týdning í valinum av bústaði: Við at keypa hetta økið, sum var hundraðtúsund+ krónur bíligari, kundu tey ístaðin brúka tann sparda peningin uppá húsini, heldur enn uppá sjálvt grundøkið.

Tað var tó eitt lítið MEN við hesum grundøkinum Millum Hjalla:

- Ja, sum tú sært er tað sera høgt her og ein rættiliga stórur jarðarmunur. Eg hevði mínar betonkiligheitir við tí, men her var ikki so nógv annað at velja í, og tí tóku vit av.

- Og satt at siga, vænti eg ikki at vit koma at angra tað, endurtekur hann.

## Sólsíðan

Tað eru eini hús við vøkrum útsýni, sum Thorleif Eyðun í dag letur byggja heruppi.

Eitt er tað, hvørji hugskot ein kann hava til innrætting og útsjónd av húsum. Annað er at fáa øll hesi hugskotini at hóska saman og fest á blað í eini tekning. Tað fekk hann ein vinmann at gera, soleiðis at húsini fara at teljast millum tey snotiligastu, tá tey einaferð verða liðug.

Eitt kundi hann kortini ikki "fyrireika" sum so, og tað var útsýnið. Ein má í roynd og veru niðan higar at staðfesta, hvussu væl húsini liggja fyri. Hetta er uttan iva ein hin størsti fongurin við plaseringini.

Eyðun er sjálvur uppvaksin á vestara armi í Klaksvík - í Víkunum, tey kalla - á tí arminum, sum hann við einum brosi nevnir skuggasíðuni í býnum, tí tey ikki hava sólina allan dagin. Nú hevur hann ístaðin valt at búseta seg á sólsíðuni.

Húsini hjá Thorleif Eyðuni standa soleiðis, at hann nú kemur at hava sólina allan dagin - frá morgni til myrkurs, tá hon altso er frammi! Aftrat hesum kann hann úr stovuni ella á altanini njóta allan tann ótrúliga vakurleikan yvir ein part av heimbýnum, á sjálvari víkini, heilt har suðuri frá og allan vegin norður í Haraldssund.

- Vit koma at hava eitt fantastiskt útsýni. Og her verður heldur einki bygt uppfyri, slær hann fast.

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

***»Eg sigi bara sum so: Verður tað liðugt á jólum í ár, so er tað gott. Men verður tað ikki liðugt á jólum, ja, so verður tað ikki liðugt á jólum!«***

***»Eg hevði mínar betonkiligheitir við tí, men her var ikki so nógv annað at velja í, og tí tóku vit av.«***